

*Á Familjudegnum, sum verður í Hvalvíkar skúla, verður m.a. ein køkuvakurleikakapping á skránni. Tá vinnarin er funnin, verða køkurnar burturlutaðar*

## Familjudagur í Hvalvík

Leygardagin 4. september skipar bygdafelagið Brúgvin fyri familjudegi í Hvalvíkar skúla. Hetta er aðru ferð at Familjudagur verður hildin. Fyrru ferð vitjaðu Angela og Hannibal, og hesu ferð vitja Búktalari og Gandakallur.

Eisini er tiltikna køkuvakurleika kappingin á skránni. Vinnarin fær virðisløn, og aftaná verða køkurnar burturlutaðar.

Nógv annað hugtakandi verður á skránni, sosum súkklubani, bommtombola, bóltkast og sølubúð við heimagjørdum lutum. Tiltakið byrjar kl. 15 og verður væntandi liðugt kl. 18.

## Nýggj bók

»Urbscriptum. Fimtan tekstir« eitur nýggj bók eftir Firouz Gaini.



*Firouz Gaini hevur skrivað bókina, nevnd »Urbscriptum. Fimtan tekstir«*

Teir fimtan tekstirnir snúgva seg um sjey býir í Evropa. Napoli, paris, Moskva, St. Pætursborg, Barcelona, Keypmannahavn og Tórshavn.

Tekstirnir hava allir staðið í føroyskum bløðum í árunum 1999-2004.

Tekstirnir snúgva seg um mentan og list, søgu og samleika, longsul og ferðing.

Bókin er 105 síður og kostar 120 kr.

Hon fæst ´í bókhandlunum og á www.underskoven.dk.

*eys*

# Grønir skúlar í Tórshavnar kommunu



*Allir skúlarnir í Tórshavnar kommunu verða við í nýggju umhvørvisverkætlanini. Øll, ið hava dagliga gongd í skúlanum, skulu nú hugsa um orkusparing.*

**Mánakvøldið 1. september vóru skúlastýrini í Tórshavnar kommunu bjóðað til ein kunnandi fund um eina verkætlan, ið hevur heitið »Á veg ímóti grønum skúlum«**

GRØNIR SKÚLAR

Tórshavnar kommuna hevur nú tikið avgerð um at taka annað skinn um bak, hvat ið orku- og umhvørvisøkinum viðvíkur. Í hesum skúlaárinum skulu skúlarnir í kommunini nevnniliga arbeiða við eini verkætlan, nevnd »Á veg ímóti grønum skúlum«.

Endamálið við verkætlanini er at fáa øll við tilknýti at skúlunum at vísa størri skynsemi og umhugsni, tá tað kemur til orkunýtslu. Bæði lærarar, næmingar, skúlaleiðslur, skúlatænarar og onnur starvsfólk, skulu nú leggja seg eftir at nýta orku við skili.

### El- og oljunýtsla

Í fyrsta umfari fer verkætlanin serliga at snúgva seg um el- og oljunýtsluna, har ymisk átøk skulu tálma ella minka um orkunýtsluna.

Samstundis er verkætlanin byrjanin til eina størri umhvørvisætlan, har endamálið er at fáa skúlarnar í Tórshavnar kommunu at verða góðkendir sum sonevndir Grønir skúlar.

Ein stýrisbólkur skal orða eina umhvørvisætlan fyri hvønn skúla sær. Hesir bólkarnir verða mannaðir við lærarum, næmingum og skúlatænarum úr øllum skúlunum. Saman við ráðgevanum skal ætlanin so leggjast.

Stýrisbólkarnir fara at verða høvuðsamboði í verkætlanini, men ætlanin er, at øll, sum hava dagliga gongd í skúlunum skulu taka lut í ætlanini. Skipað verður nevniliga fyri ymiskum tiltøkum t.d. evnisdøgum, kappingum, spølum, umframt at undirvísingartilfar verður útvegað skúlunum.

### Egna heimasíðu

Verkætlanin fer at hava sína egnu heimasíðu. Tað fer at vera møguligt hjá øllum at fara inn á heimasíðuna, at fylgja við dagligu orkunýtsluni í skúlunum. Hetta letur seg gera, við elektroniskum orkumálarum, ið SEV setur upp í skúlunum, sum eitt royndarprojekt í sambandi við verkætlanina.

Heimasíðan fer eisini at hava fleiri aðrar teigar, ið eru ætlaðir skúlunum, og har umhvørvisarbeiði í skúlunum allatíðina verður dagført.

Á heimasíðuni verður eisini møguleiki hjá lærarum, næmingum, skúlatænarum og øðrum at koma við nýggjum hugskotum um orkufremjandi tiltøk, broytingar ella minni verkætlanir.

Tað er ráðgevandi verkfrøðingafyritøkan Veri-Con PF, ið samskipar verkætlanina. Fyritøkan hevur eisini gjørt uppskotið um umhvørvisætlanina.

Nógvar fyritøkur og handlar í býnum eru stuðlar hjá verkætlanini. Talan er um veitingarfeløg hjá kommununi og skúlunum, ið hava víst ætlanini áhuga. Hesi koma eisini at vera við í arbeiðnum á orku- og umhvørvismálum í kommunalu skúlunum.

*eys*

# Fótbóltur og dansur í Føroyahúsinum

Leygardagin 4. september hava allir føroyingar í Keypmannahavnsumráðnum, møguleika til at síggja HM undandystin ímillum Føroyar og Sveits.

Dansifelagið Fótatraðk skipar nevniliga fyri einum rimmar fótbólts og dansikvøldið, nú nýggja lestrarárið júst er byrjað.

Bæði dysturin ímillum Føroyar og Sveits og dysturin ímillum Danmark og Ukraine verða vístir á stórskýggja.

Møguleiki verður at keypa heimagjørda pizza og eitthvørt leskandi afturvið.

Eftir fótbóltin, frá kl 22-04, spæla Hans Petur í Brekkunum, Stamen Stanchev, Agnar Lamhauge, Hans Pauli Tórgarð og Trúgvi í Brekkunum til dans.

Portrið letur aftur kl 01, so fólk verða biðin um at vera við dyrnar áðrenn kl 01. Atgonugmerkini kosta 80 kr.

*eys*



Friðarbogin:

# Ongan áhuga í kirkjuligum vígslum

**- Tað er als ikki neyðugt við kirkjuligum vígslum, og tað er heldur ikki eitt mál hjá okkum. Tað er fyrst og fremst skrásetta parlagið, ið vit vilja arbeiða fyri, sigur forkvinnan í Friðarboganum, Tina Jakobsen**

KIRKJULIG VÍGSLA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*



*Áhugafelagið hjá teimum samkyndu, Friðarboðin, sýnir ongan áhuga í kirkjuligum vígslum í Føroyum. Forkvinnan í Friðarboganum, Tina Jakobsen, sigur, at felagið hevur onnur meir átrokandi mál á skránni.*
*Modellmynd: Jens Kristian Vang*

Hóast kjakið hevur gingið lívliga um vígslu av samkyndum í Føroyum, hevur áhugafelagið hjá samkyndum í Føroyum, Friðarbogin, ikki ynski um kirkjuligur vígslur av samkyndum í Føroyum. Forkvinnan í Friðarboganum, Tina Jakobsen, sigur, at felagið hevur onnur meir átrokandi mál á skránni.

– Tað er als ikki neyðugt við kirkjuligum vígslum, og tað er heldur ikki eitt mál hjá okkum. Tað er fyrst og fremst skrásetta parlagið, ið vit vilja arbeiða fyri. Tað er av nógv størri áhuga hjá okkum at tryggja arvarættin og vinna onnur løgfrøðilig rættindini enn, at vit fáa kirkjuligur vígslur. Skrásetta parlagið er eitt ófrávíkiligt krav frá okkara síðu, sigur Tina Jakobsen.

Hon leggur afturat, at felagið hjá samkyndum arbeiðir miðvíst fyri at tryggja samkyndum somu sosialu og búskaparlig rættindini, sum aðrir borgarar í føroyska samfelagnum hava.

Verður skrásetta parlagið samtykt á løgtingi, kann tað so hugsast, at tit fara at berjast fyri kirkjuligum vígslum?

– Vit hava viðgjørt spurningin um kirkjuligar vígslur í felagnum, og har tykist breið semja vera um, at hatta skal ikki vera nakað mál hjá okkum. Eg dugi tí ikki at síggja, at hatta kemur á dagsskrá, men tað er bara mín persónliga meining, sigur forkvinnan í Friðarboganum

### Samstarv

Í Danmark tykist nærum kapping verða um, hvør er fyrsti politikarin at stuðla teimum samkyndu í spurninginum um kirkjuligar vígslur. Herfyri varð forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, heiðraður fyri, at hann persónliga segði seg stuðla teimum samkyndu í stríðnum um at blíva vígd í kirkjuni.

Tina Jakobsen er fyri stuttum flutt til Danmarkar í lestrarørindum, og hon fylgir við í kjakinum í Danmark.

– Jú eg royni at fylgja við, hóast hatta ikki er eitt mál, ið vit stríðast fyri. Vit arbeiða við at fáa samband við LBL(áhugafelagið fyri samkyndum í Danmark, blðm). Eitt samstarv kundi verið mennandi fyri bæði feløgini, og eg ivist ikki í, at LBL kundi verið ein hjálp hjá okkum at komið víðari í Føroyum, heldur Tina Jakobsen.

### Nýggjan formann

Tað er um 30 limir í Friðarboganum í dag, meðan góð 120 fólk hava meldað seg sum stuðulslim í felagnum. Tina Jakobsen hevur verið forkvinna síðan felagið fór undir sítt virksemi fyrr í ár. Tina er flutt av landinum og tí fer Friðarbogin at finna nýggjan formann. Nýggi formaðurin skuldi finnast hóskvøldið.

# Skiljið politikk og átrúnað

**Løgtingið er á einum máli um, at politikarar ikki eiga at áleggja kirkjuni at víga samkynd í Føroyum. Kirkjan ger sjálv av, hvat innihaldið skal vera, og ikki politiski myndugleikin**

KIRKJULIG VÍGSLA
*Pàll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í løgtinginum mikudagin var støðan hjá teimum samkyndu aftur á skránni. Seinastu tíðina hevur ikki trotið við málum í løgtinginum, sum umrøða støðuna hjá teimum samkyndu í føroyska samfelagnum, og tað tykist sum um kjakið um tey samkyndu er við at fáa størri og størri rúmd í føroyska samfelagskjakinum.

– Tað vísir seg nærum verða líkamikið, hvat vit viðgera í tinginum, so skulu tey samkyndu dragast inn.

Tjóðveldistingmaðurin, Tórbjørn Jacobsen, tóktist verða eitt sindur órógvaður av kjakinum um tey samkyndu í Føroyum.

Hvussu er og ikki, setti løgtingslimurin hjá Miðflokkinum, Bill Justinussen, landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni ein munnligan spurning um tey samkyndu mikudagin í tinginum.

Miðflokkamaðurin vildi vita, hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til ætlanirnar hjá donum um at víga samkynd í fólkakirkjuni, og hvørjar avleiðingar ein slík lógarbroyting kann fáa fyri føroysku fólkakirkjuni, ið er danskt málsøki.

### Kirkjan ger av

Landsstýrismaðurin svaraði Bill Justinussen, at tað er fyrst og fremst kirkjan sjálv, ið ger av, hvat innihaldið og boðskapurin í kirkjuni skal verða-og ikki politiski myndugleikin. Jógvan á Lakjuni slerdi fast, at hann ynskti, at henda mannagongd helt fram.

Flestu løgtingsmenn tóku undir við sjónarmiðjunum hjá landsstýrismanninum um at hava greiðan skilna millum átrúna og politik. Semja var um, at politikarar einans eiga at seta ytru karmarnar fyri kirkjuni, meðan kirkjan sjálv ger av, hvat innihaldið skal vera.

Javnaðartingmaðurin, Gerhard Lognberg, hevði hinvegin eina øðrvísi áskoðan. Hann segði bart út, at verður tað veruleiki, at samkynd kunnu vígast í kirkjuni, eiga politikararnir at blanda seg upp í viðurskiftini og í kirkjuni og tað sum tað stendur eftir á, sum hann málbar á tingsins røðarapalli.

# Álop á kirkjuna

**Vit mugu standa á varðhaldi og verja kirkjuna. Tað er Guds orð, ið eigur at vera grundarlagið undir kirkjuni og ikki, hvat ein meirluti av politikarunum ella fólkinum heldur, stendur í oddagrein í Trúboðanum**

KIRKJULIG VÍGSLA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Oddagreinskrivarin á blaðnum hjá Heimamissiónini í Føroyum, Frants Jensen, kallar ætlanirnar hjá donum at víga samkynd í fólkakirkjuni fyri eitt beinleiðis álop á kirkjuna. Hann vísir á, at tey samkyndu tykjast hesaferð ikki at standa so einsamøll, sum tey áður hava gjørt.

-Nú eru tað eisini fleiri politikarar, ið beinleiðis vilja stuðla teimum at fáa kirkjuliga vígslu ígjøgnum politiskt. Eisini millum prestarnar tykist sum um, at fleiri hava broytt støðu, stendur í oddagreinini.

### Guds orð

Frants Jensen heldur ikki, at ein meirluti av politikarunum ella meirilutin av fólkinum skal sleppa at gera av, hvat er rætt og skeivt í kirkjuni. Tað er einans Guds orð, sum er kirkjunnar grundarlag, og verður hetta grundarlag tikið burtur, so rapar restin og tá er kirkjan endaliga fokin, heldur oddagreinsskrivarin.

Hann heldur tað er av stórum týdningi, at vit standa á varðhaldi og verja kirkjuna, nú røddir eru í Danmark um at loyva vígslu av samkyndum í kirkjuni.

– Vit hava tíbetur ein biskup, sum áður hevur sagt, at hann gongur ikki inn fyri vígslu av tveimum av sama kyni. Tað sama hava fleiri prestar í Føroyum eisini sagt. Vónandi vilja teir halda fast við sína støðu og ikki víkja frá henni, nú tað tykist sum rákið er við at venda, stendur í oddagreinini.